## Rennur fyri lívinum

Seinasta fríggjadag kom walisiska kvinnan Rosie Swale Pope við leiguflofari úr Kanada til Grønlands. Tann 61 ára gamla Rosie hevur krabbamein og hevur sett sær fyri at renna runt Jørðina fyri at gera vart við sjúkuna og kanska bjarga mannalívum. Hon sigur við grønlendska útvarpið, at hon hevur altíð droymt um at sleppa til Grønlands. Haðani ætlar hon sær við til Íslands, og har skal hon renna tvørtur um alt landið, sigur hon.



## Grønland verður broytt

- Grønland hevur í dag nakrar heilt aðrar møguleikar á vinnuøkinum, men hetta fer eisini at geva avbjóðingar. Tað segði Siverth K. Heilmann, landsstýrismaður í vinnu- og arbeiðsmarknaðarmálum, á einari ráðstevnu í Nuuk í síðstu viku. Hann segði, at grønlendingar mugu fyrireika seg upp á nógvar og stórar broytingar í gerandisdegnum, og at tær gomlu vinnugreinarnar fara at fáa minni týdning, so hvørt sum tær nýggju vinna fram.

# Lættari at skilja tryggingar



*Helgi L. Petersen, deildarstjóri, og Edvard Heen, stjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur broytt treytirnar í serliga akfarstryggingini, so hesar nú eru greiðari og lættari skilligar. Hetta verður gjørt sum ein liður í einum opnari samskifti við kundarnar**

TRYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í hesum døgum sendir Tryggingarfelagið Føroyar út 19.000 brøv til kundar sínar, har greitt verður frá broytingum í tryggingartreytunum serliga innan akfarstryggingna.

- 90% av hesum brøvum eru til okkara privatkundar, sigur Helgi L. Petersen, sum er deildarstjóri fyri privatkundaøkið.

Edvard Heen, stjóri, greiðir frá, at tað eru nógv ár síðani, at akfarstryggingin varð dagførd seinast, og mann nú hevur ynskt at tillaga tryggingina soleiðis, at hon er meiri greitt orðað, samstundis sum hon eisini fylgir rákinum í samfelagnum, serliga tá hugsað verður um ferðslutrygdina.

Men eisini á einum øðrum øki eru treytirnar munandi linkaðar, og tað er innan uppsøgn av einari trygging, sum nú í allarflsetu førum er sett niður úr 12 mánaðum til 30 dagar

Umframt hetta, so hava vit nú eisini innført ein angringarrætt, so tú upp til 14 dagar eftir at hava teknað eina trygging, kanst angra og verða loystur frá henni aftur uttan trupulleikar, sigur Edvard Heen.

Men tær mest umfatandi broytingarnar eru framdar innan akfarstryggingina.

### Greiðari orðað

Broytingarnar eru framdar fyri at gera treytirnar greiðari. Men eisini – sum longu nevnt – fyri at fylgja rákinum serliga innan ferðslutrygd.

Ein av broytingunum er, at Tryggingin nú krevur, at persónur skal hava koyrikort, fyri at fáa endurgjald fyri skaða á akfarið. Hetta ljóðar púra náttúrligt, men hevur verið orðað á ein illa skiljandi hátt og eisini soleiðis, at tað hevur áligið Tryggingini at prógva ella mótprógva koyrikynstrið hjá fólki.

Ein onnur broyting er defineringin av einum vanlukkutilburði. Fyrr æt tað »Ein óvart áberandi, brádlig ávirkan á kroppin uttanífrá, sum hevur við sær sjónligan skaða, hetta uttan vilja hins tryggjaða«

Ein sera tungur og illa skiljandi setningur, sum nú eitur »Við vanlukkutilburð er at skilja ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða«.

Ein onnur broyting, sum hevur við ferðslutrygdina at gera, er, at tað nú verður skila til, at dekkini eru í rímiligum standi. Tryggingin tekur nevniliga ikki við nú, um dekkini eru niðurslitin.

Sum nakað nýtt eru nú húsfólkini javnsett við tryggingartakaran.

Eisini hevur tað verið ein ævig kelda til kjak, nær fult endurgjald eigur at latast fyri skaðar á lakk. Nú er uppsett ein tabell, sum greitt vísir hetta endurgjaldið.

### Ongar fartelefonir

At enda eru nú greiðari treytir fyri, hvussu nógv verður goldið í bilsakni, tá bilurin er til umvælingar.

Sum nevnt eru hetta mest dagføringar í tryggingartreytunum, men Tryggingarfelagið Føroyar hevur tó gjørt eina aðra broyting í innbúgvstryggingini, og tað er, at fartelefonir ikki longur verða tryggjaðar. Hendan broytingin kemur í gildi frá 1. mars 2008, meðan akfarstryggingarnar koma í gildi, tá gjaldast skal næstu ferð.

Viðvíkjandi fartelefonum sigur Edvard Heen, at hagtølini fyri Føroyar vísa, at skaðar á fartelefonir eru munandi fleiri her hjá okkum, enn í londunum uttan um okkum. Endurgjald fyri fartelefonir er komið upp á eina sjeysifraða upphædd, og tí hevur Tryggingarfelagið Føroyar metta seg noytt at gera nakað við hendan trupulleikan.

Broytingarnar fevna ikki um prísbroytingar.

# Vildu hava Sjálvstýrið við

**Hjá formanninum í Tjóðveldi, Høgna Hoydal, er eingin ivi. – Stóð tað til okkum, hevði Sjálvstýrisflokkurin verið partur av samgongusamráðingunum, sigur hann**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Samgongusamráðingarnar ganga væl. Tað eru allir tríggir floksformenninir samdir um.

Í sjónvarpinum í gjárkvøldið lótu bæði løgmaður og samráðingarleiðarin, Jóannes Eidesgaard, og formaður Miðfloksins, Jenis av Rana, sera væl at, og tá vit høvdu formannin í Tjóðveldi, Høgna Hoydal, á tráðnum í morgun, helt hann eisini, at samráðingarnar síggja spennandi út.

- Eg haldi, at tað gekk væl framá í samráðingunum í gjár, sigur hann, men vísir samstundis á, at einki er liðugt í einum samráðingum, fyrr enn alt er liðugt.

Hann heldur ikki, at tað ber til at meta nakað serligt um, hvussu líkindini eru, fyrr enn tað er fingið eitt fullfíggjað grundarlag at meta út frá.

- Tað gevur onga meining at umrøða tey einstøku málini, tí tað er neyðugt at hava samlaða úrslitið at meta út frá, sigur Høgni Hoydal.

Hann er annars sera varin í sínum úttalilsum, men sigur kortini, at teir hava havt nakrar góðar fundir í gjár. Nógv mál eru umrødd, eisini spurningurin um ríkisrættarligu støðuna, men enn er ikki komið á mál í hesum spurningi.

### Vildu hava Sjálvstýrið

Í einum máli eru flokkarnir tó ikki samdir, og tað er í spurninginum um breiddina av samgonguni. Tí meðan formenninir í Javnaðarflokkinum og Miðflokkinum síggja fyrimunir í einari so smalari samgongu sum yvirhøvur gjørligt, var tað ikki eftir ynski frá Tjóðveldi, at Sjálvstýrisflokkurin í gjár fekk krakk frá løgmanni.

- Hatta var ein avgerð hjá samráðingarleiðaranum, og hon var ikki eftir okkara tykki. Vit vildu fegin hava Sjálvstýrisflokkin við í samráðingarnar, men soleiðis endaði altso ikki, sigur Høgni Hoydal.

Formaður Tjóðveldis sær tað við øðrum orðum ikki sum nakra styrki, at ætlaða samgongan bert hevur 17 tinglimir aftan fyri seg, og hevði fegin vilja havt stuðul frá Kárunum báðum í Sjálvstýrisflokkinum.

Men framvegis heldur Høgni Hoydal, at samráðingarnar síggja spennandi út.



*Høgni Hoydal sigur, at tað ikki var við hansara vilja, at Sjálvstýrið ikki slapp upp í samgongusamráðingarnar*